

# Rooney kløkkur av reyða kortinum

Wayne Rooney hevur verið nógv umtalaður, síðani hann fekk reytt kort í fjórðingsfinaluni hjá Onglandi ímóti Portugal leygardagin. Men høvuðspersónurin sjálvur tvíheldur um, at hann átti ikki at fáa reyða kortið.

– Eg ætlaði mær als ikki at traðka á Carvalho, og eg eri sera vónbrotin av, at eg fekk reyða kortið. Eg minnist væl støðuna og havi eisini sæð hann umaftur í sjónvarpinum. Eg royndi bara at vera standandi á beinunum, sigur Rooney við BBC.

Hann sigur eisini, at hann ikki ber agg til liðfelagan úr Manchester United, Cristiano Ronaldo, tí hesin royndi at fáa dómaran at revsa Rooney við reyðum korti.

# Carlos gevst á landsliðnum

33 ára gamli Roberto Carlos hevur nú boðað frá, at hann gevst at spæla á brasilska fótbóltslandsliðnum. Brasil tapti leygardagin fjórðingsfinalu ímóti Fraklandi, og hetta gjørdist samstundis seinasti dysturin hjá Carlos.

Roberto Carlos hevur verið stuðulsspælari á brasilska landsliðnum í nógv ár, og fyri fýra árum síðani var hann við til at vinna heimsmeistaraheitið. Nú reyk Brasil út úr endaspælinum longu í fjórðingsfinaluni, og tað var ein vónbrotin Carlos, sum boðaði frá sínari avgerð.




*sen, Heidi Andreasen, Anja Sjóstein, Paula Sjóstein, Mariann Joensen,*

*Ziskason, Randi S. Wardum, Elsa Maria Simonsen, Rannvá Andreasen,*

*Mynd: Norðlýsið*



*KÍ skoraði tvey mál fyrstu 20 minuttirnar, og tað var nóg mikið til at vinna steypafinaluna*

fekk skaða miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og KÍ varð noytt at umskipað liðið. Malena Josephsen, sum vanliga spælir í álopinum fór í verjuna at spæla, og hon stóð seg væl, hóast støðan tóktist ótrygg fyrstu løtuna eftir skiftið.

KÍ kom fleiri ferðir ígjøgnum í síðunum, men tær fingu ov lítið burtur úr innleggunum, sum lógu nær við málið, og tá Vivian Bjartalíð í seinna hálvleiki gjørdist púra leys í vinstru, misnýtti hon besta tilboðið hjá KÍ í seinna hálvleiki.

KÍ-liðið spældi til tíðir ov beinleiðis, og onkuntíð sparkaðu tær meira, enn tær spældu. Tað gjørdi, at AB-liðið fekk leikliga yvirvág í stórum løtum.

### Fingu steypið til Klaksvíkar

Hóast AB gjørdi alt fyri at skora, og stuðulin frá viðhaldsfólkunum var góður allatíðina, so gjørdist tað sigursvanda liðið úr Klaksvík, sum vann steypafinaluna 2-0.

KÍ vann steypið fyri fimtu ferð, og felagið hevur vunnið tað til ongar. Í fjør noyddist KÍ at lúta fyri B36 í steypafinaluni, men hesaferð var liðið aftur á sigurskós, og hóast KÍ-kvinnurnar í seinna hálvleiki meira vardu seg enn spældu seg til sigurin, so var tað ikki bara av tilvild ella hepni, at KÍ vann dystin.

Liðið úr Klaksvík er mannað við nógvum royndum spælarum, og teir gera mun í slíkum dystum, tá tað stendur á. AB-liðið hevur als ikki somu rutinu, og hóast tær vóru raskar og framfýsnar, so máttu tær hesaferð lúta fyri KÍ-liðnum.



*Tað hendi nógv í finaluni. Bæði liðini høvdu góðar møguleikar at gera mál, og tá áttu at komið fleiri enn tey tvey málini, ið vórðu skotin.*

*Mynd: Norðlýsið*




*Tony Farrel, sum starvast á Everton FC Academy, var høvuðsvenjari á fótbóltsskúlanum hjá KÍ í farnu viku. Mynd: Guttorm Sørensen*

# Everton-venjari legði lag á

**100 børn vóru í farnu viku á fótbóltsskúla, sum KÍ skipaði fyri í samstarvi við Premier League-felagið Everton FC**

FÓTBÓLTSSKÚLI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mikudagin og hósdagin í farnu viku vóru 100 børn og ung á fótbóltsskúla, sum KÍ skipaði fyri í samstarvi við Premier League-felagið Everton.

Høvuðsvenjari á skúlanum var Tony Farrell, ið starvast á Everton FC Academy, og saman við honum stóðu eisini føroyskir venjarar fyri venjingini av teimum ungu – millum annað Tony Paris og Jákup Mikkelsen.

### Venjingar úr Onglandi

Hugskotið við fótbóltsskúlanum var at geva luttakarunum eina hóming av, hvussu ungir spælarar venja á fótbóltsskúla hjá einum Premier League-felagi.

Tony Farrell hevði lagt venjingarnar til rættis, og talan var um øvilsi, ið vanliga verða brúkt í venjingini av teimum evnaríki spælarunum hjá Everton.

Teknisk venjing var í miðdeplinum. Venjingarnar vóru skipaðar sera miðvíst, so at spælararnir kundu byrja við einføldum øvilsum, og síðani leggja alt meira fyri.

### Fleiri vitjanir

KÍ hevur seinnu árini havt vitjan av fleiri útlendskum venjarum, og hesar vitjanir verða misvíst brúktar í arbeiðnum við ungdómsspælarum í felagnum.

Fyri tveimum árum síðani var ungdómsvenjari úr Liverpool høvuðsvenjari á fótbóltsskúla hjá KÍ, og síðani hava venjarar sum Foppe de Haan, U21-landsliðsvenjari hjá Hollandi, og Roy Millar, leiðandi venjari í írska fótbóltssambandinum, vitjað í Klaksvík.

Umframt at venja ungar spælarar í felagnum, hava hesir venjarar eisini undirvíst ungdómsvenjarum í KÍ, og tað hevur verið góður íblástur hjá teimum at fáa.